LM-099/2023

Joanna Djurhuus

Fra: Tróndur Gilli Leivsson
Sendt: 23. februar 2024 19:46
Til: Joanna Djurhuus
Cc: Herálvur Joensen
Emne: Viðv.: hugleiðingar til UVMR

Halló tit bæði.

Í ásannanini av, at tað ikki hoyrir til góðan fyrisitingarsið, at undirliggjandi stovnur sendir egnum aðalráði skrivligt hoyringssvar, so fari eg hinvegin heldur at loyva mær at senda tykkum báðum hesa hugleiðing í málinum um "gongd i haga". Síðani hugsi eg mær, at tit leggja tykkum okkurt av hesum í geyma og vónandi taka tað við í endaliga arbeiðið viðvíkjandi lógaruppskotinum um burðardygga ferðavinnu.

Ásannandi, at lendið í Føroyum í allar flestu førum er serstakliga vanvart, eigur ein nýmótans hugburður til virksemi í og nýtslu av lendinum uttanfyri bygt øki helst at venda øvut í mun til ta fatan, sum annars vanliga valdar nú á døgum.

Stutt um náttúrugivna grundstøði:
Føroyar eru oyggjaland í miðum Atlantshavi; eru runnar av basalti, og eru staðsettar norðarlaga á klótuni. Lendið er sundurliðað í størri og minni oyggjar, har havið setir sín tærandi dám á, og strandarlinjan er tí lutfalsliga stór í mun til samlaðu lendisvíddina. Hægstu tindar eru upp í 880 m yvir havinum, og miðalhæddin á lendinum er lutfalsliga høg, uml. 250 m yvir havinum. Lendið er tí mangan bratt. Basalt er grótslag, ið tærist lutfalsliga lætt av veðri og vindi, serliga av vætu og frosti í samvinnu. Jørð, ið runnin av basalti, er somuleiðis vanvar í mun til jarðarmáan (erosjón), og lutfalsliga stór lendi eru uttan gróður. Vandin fyri skriðulopum og øðrum omanlopum er tí mangan stórur, og føroyska lendið ber sanniliga mong arr frá bæði omanlopum, skriðulopum, skalvalopum og áarlopum v.m.
Staðsetingin í Norðurhøvum, og á farleiðunum fyri lágtrýstini í Atlantshavi, gevur Føroyum eitt sokallað havveðurlag (maritimt klima) við óstøðugum og mangan buldrasligum veðri; lutfalsliga nógvum avfalli, lágum summarhita og líggjum vetrum við óstøðugum hitalagi.
Í gróðrarfrøðiligum høpi verða Føroyar staðfestar sum eitt "undirøki á Norðurleiðum við sermerktum dámi stavandi frá havverðurlagnum" (highly oceanic sector of the hemiboreal sub-zone); og kanningar hava somuleiðis staðfest, at omanfyri uml. 250 – 300 m yvir havinum, er talan um arktisk veður- og vakstrarlíkindi. Ymsi vøksturin, sum trívist undir tílíkum vakstrarlíkindum, er avgjørt at meta sum serstakliga vanvarur. Tí er hellulandið kring oyggjarnar ivaleyst einasta slitsterka lendi frá náttúrunar hond.
Trábitið frá kríatúrum av føroyska lendinum gjøgnum øldirnar, heilt frá landnámi av, hevur somuleiðis sett sín dám á niðurpínda gróðurin.
Vøksturin í Føroyum, bæði á t.d. mólendinum sum er vanligt í láglendinum, eins og vøksturin í teimum hægri liggjandi økjunum, er serstakliga sárbærur mótvegis sliti frá t.d. gongd og aðrari ferðslu; hetta síggja vit jú eisini týðiliga manga staðni kring landið nú, har ferðsla av fólki hevur vundið uppá seg seinastu árini.

Hetta er nakni veruleikin. Alt prátið um "føroysku náttúruna" er ein illusjón. Strandingurin, Jóhannes Johansen, doktari í plantufrøði, ið veruliga var við til at bróta upp úr nýggjum viðvíkjandi føroyskari náttúrusøgu, segði á eini ráðstevnu um vøkstur í Føroyum fyrst í 1980-unum, at eftir hansara tykki var hellulandið einasta órørda lendisslagið í Føroyum; restin var eftir hansara tykki alt samalt eitt "kulturlandskab". Eg kann bert taka undir við Jóhannusi.

Nútímans framferðarháttur:
Ein vitanargrundað, nýmótans áskoðan á virksemi í og nýtslu av føroyska lendinum uttanfyri bygt øki eigur tí ivaleyst at byggja á somu grundsjónarmið, sum nýtt vórðu sum fortreyt í Ll. um náttúrufriðing frá 1970, nevniliga, at uttangarðs eigur einki virksemi ella nøkur lendisnýtsla at fara fram, uttan í teimum førum, har heimild frammanundan er fingin til tess (í tí lóggávuni var tó virksemi eftir gomlum siði heimilað í forhond). Spurningurin um heimildir til frameftirlítandi og nýmótans virksemi og lendisnýtslu uttanfyri bygt øki eigur

fakliga sæð nú á døgum at verða viðgjørdur sbrt. m.a. býarskipanarlóggávuni, landbúnaðar- og djóravælferðarlóggávuni, náttúrufriðingar- og umhvørvisverndarlóggávuni (og somuleiðis fornminnalóggávu har tað er viðkomandi).
Tað kann væl vera, at okkum tørvar eina "frílendis- og fríluftslívslóggávu", sum er í øðrum londum (t.d. Noreg).

Reikan í haga, hólmum, skorum og fitilendum; í fjøllum, líðum, dølum, vøtnum og áum v.m., eigur ikki at vera loyvd uttan í sambandi við heimilað yrki ella heimilað frítíðarvirksemi v.m. (altso eingin almannarættur).
Føroyska landslagið/lendið tolir als ikki slitið og annað árin, sum stendst av fylgjunum av einum almannarætti (ein tílíkur almannarættur má síggjast í samanhangi við lendisvíddir o.tíl. í mun til fólkatal/vitjandi v.m.).
Almannarætturin vil í myndamáli ivaleyst viðvirka til at "saga greinina av, ið vit sita á".
Atgongd hjá borgarum til hesi øki skal fara fram og verða skipað sambært ítøkiligum heimildum veittar sbrt. ásetingum givnar í m.a. býarskipanarlóggávuni; eftir eina fakliga viðgerð m.a. við ítøkiligum atliti mótvegis aðrari viðkomandi lóggávu, eins og áhugamálunum hjá bæði lendiseigarum og -brúkarum og hjá heimafólkinum á staðnum.
Síðani kann ein landsmyndugleiki, t.d. ein fakliga og heimildarliga styrkt Býarskipanarnevnd landsins, tryggja saklig atlit, yvirskipaði landsáhugamál, fakliga dygd og fyrisitingarrættarligar grundreglur sum t.d. líkheitsreglu, prpporsjonalitet v.m.

Vert er at umhugsa í sambandi við lóggivnar meginreglur, at:

- ✓ Gevur lóggávan sum útgangsstøði fult frælsi, er hópin meira torført at koma afturumaftur seinni við ásetingum um avmarkingar og við grundgevingum fyri slíkum; um tað t.d. seinni vísir seg at verða neyðugt (m.a. av politiskum "berøringsangst" v.m.).
- ✓ Ásetur lóggávan sum útgangsstøði hinvegin, at einans virksemið, sum eftir viðgerð er vorðið heimilað, kann fara fram, er smidligari at taka givin loyvi innaftur, skuldi tað seinnameiri vist seg at vera neyðugt.
- ✓ Við eini nýmótans fatan av heimilaðum virksemi uttanfyri bygt øki, átti eisini tann siðbundni parturin av verandi virksemi at verði tikin við og soleiðis fingið eina dagføring (m.a. regulering av áseyðatali, nær seyður er í haganum o.s.fr.).

Viðmerkingar til ávísar greinar í uppskotinum til Ll. um burðardygga ferðavinnu:

§ 1: ferðavinna og fólkaræði hava vælsaktans einki við hvørt annað at gera, og ferðavinna kann heldur ikki verja náttúru (hon er brúkari av náttúruni – brúkari av *"ecosystem services"*)!
Greinin eigur at verða umskrivað til, at ferðavinna skal respektera náttúrutilfeingið, siðsøgu, staðbundið virksemi og staðbundið bygdarlív v.m.

§ 2: Onga viðmerking.

§ 3: Hendan ásetingin er grundleggjandi skeiv, serliga seinasta brotið; j.f. m.a. tað, ið er sagt frá omanfyri.
Her eigur grundhugsanin at vera, at tað virksemi, ferðsla ella uppihald v.m., sum kann fara fram uttanfyri bygt lendi, skal hava fingið lýsta heimild sbrt. eini ítøkiligari viðgerð frammanundan hjá planmyndugleikanum (á staðnum).
Greinin kundi í staðin nevnt tey dømi um viðgerð og um heimildir til loyvt virksemi av ymsum slagi, ið planmyndugleikin verður heimilað at taka støðu til og eftir hvørjum mannagongdum, atlitum v.m.

§ 4: Viðvíkjandi stk. 2 meini eg, at hatta ikki eigur at vera sett í lóg, men hinvegin heldur kunna verða heimilað í eini ítøkiligari lýsing frá planmyndugleikanum.

§ 5: Viðvíkjandi stk. 2 er støðan somuleiðis, at fortreytirnar fyri evt. ferðavinnuvirksemi, eisini vinnuligum, eiga at verða ásettar í heimild frá planmyndugleikanum. Semjast eigari og operatørur tá ikki, kann mynduleikin seta treytirnar sbrt tí, ið tit hava kallað standardavtalu.

§ 6: Til stk. 1 "... gera eina ferðavinnuætlan, ið skipar og heimilar tí ferðavinnuvirksemi í kommununi, sum undirtøka er fyri ..."
Viðv. stk. 2 er kanska ivasamt, um øll hasi viðurskiftini skulu skipast í lóg, tí lógarbroyting er mangan tung, og at hesi tí hinvegin heldur áttu at verði skipað í kunngerð. Tó eigur bæði rætturin hjá kommununi at skipa lendið uttanfyri bygt øki til ferðavinnunýtslu sbrt. býarskipan og "byggisamtykt" at verða greiður; t.d. at leggja nýggjar

almennar gøtur, greiðan rætt til at skipa ferðsluna á almennum gøtum (eins og á vegi sbrt. ferðslulógini saman við løgregluni), heimild at kunna loyva reikan uttangarðs undir ávísum treytum og til ávísa tíð, v.m.

§ 7: Ein atfinning at verandi "bygdanevndum" í ymsu kommununum er, at tær bert eru vegleiðandi og at tað ikki verður lurtað eftir teimum (serliga tá á stendur). Tí átti orðingin "sum skal geva kommununi ráð um" kanska at verði herd til "sum skal geva kommununi tilmæli um", ið síðani skal fylgja við málinum í tí víðari viðgerðini.

§ 8: Hendan greinin gerst óneyðug, um heimildin hjá planmyndugleikanum sbrt. býarskipanarlóggávuni (t.e. kommununum), sum umrøtt omanfyri, til at skipa hesi viðurskifti, verður nýtt í staðin.
Gøtur ella farleiðir eru so mangt ymist; t.d. gongugøtur, rossagøtur, mountainbike gøtur, motorcross gøtur, handikap gøtur v.m. Inntriv í sambandi við gerð, røkt, trygd og viðlíkahald v.m. er sera ymist, og árin og slit á náttúruna er somuleiðis sera ymist í hesum førum. Greiðar heimildir mugu vera at skipa viðurskiftini í øllum førum. Smálutirnir hoyra ivaleyst heldur heima í kunngerð heldur enn í lóg.

§ 9: Í høvuðsheitum onga viðmerking. Sí tó mínar viðmerkingar til § 6, stk. 2, um greiðar heimildir at skipa ferðsluna v.m. (óansæð § 11 viðurskiftini).

§ 10: Onga viðmerking, sampakkar væl við líknandi áseting í Ll. um býarskipanir.

§ 11: Onga viðmerking.

§ 12: Onga viðmerking; um tað við lógliga atgongd meinast við heimildirnar lýstar sum fylgju av eini viðgerð sbrt. tí, ið eg havi umrøtt undir § 3.

§ 13; Hendan greinin er sera torfør at umsita. Hvussu við øðrum úr "rigsfællesskabet" og hvussu við teimum, sum eru fevnd av Hoyvíkssáttmálanum ? Hvussu við føroyingum búsettir uttanlands ?
Her má finnast ein annar og greiðari leistur. Felagspulju-inngjaldið eigur bert at fevna um fígging til gerð, røkt og viðlíkahald av almennum farleiðum, t.e. gøtum (sbrt. "byggisamtykt") uttangarðs og teimum útreiðslum sum kommunurnar hava av slíkum og av øðrum almannaatgongdum lendi.

§ 14: Rætt er, at tað nú verður staðfest í lóggávu, at jarðirnar eiga rætt til sín lutfalsliga part av inntøkunum í náttúruferðavinnuni.

§ 15: Onga viðmerking.

§ 16: Onga viðmerking.

§ 17: Onga viðmerking.

§ 18: Onga viðmerking.

Um tit geva mínum viðmerkingum gatur, hevði eg hildið, at til ber at skipa almenna atkomu til óbygda lendið í Føroyum á ein hátt, sum stendur mát við tað, ið lendið og náttúran tola; og annars at avmarka virksemið og nýtsluna av føroyska lendinum uttanfyri bygt øki til eitt náttúru- og umhvørvisliga burðardygt støði, og somuleiðis halda fast í ávikavist bæði sosiala burðardygd og fíggjarliga burðardygd 😊

Umhugsað eigur at vera at fingið sett evropeiska landslagssáttmálan í gildi fyri Føroyar.
"Den europæiske landskabskonvention", Strasbourg í 2000. Sí: https://rm.coe.int/16802f3fa7

Tit eru sjálvandi vælkomin at kunna landsstýrismannin um míni sjónarmið.

Blíðar heilsur Tróndur

Tróndur Leivsson, *stjóri*
trondurl@bst.fo | +298 29 90 10